

Barack Obama (Mynd: EPA)

# Obama lagt fram nýggja orkuætlan

**Steinar Patursson**

04.08.2015 - 10:38

Oljan.fo

Í gjár legði Barack Obama forseti fram nýggja orkuætlan.

Eftir at hava verið í tvídysti við olju- og kolídnaðin nú í seks ár hevur Obama loksins lagt fram víttfevnandi ætlanir um at umskipa amerikanska orkuídnaðin, soleiðis at CO2 útlátið fer at minka munandi.

Ætlaninar hjá Obama skulu minka um útlátið (at telja frá 2005) við 32% áðrenn 2030. Hetta svarar sambært The Guardian til útlátið frá 70% av øllum bilunum í USA.

- Veðurlagsbroytingar eru ikki longur bara um at verja heimin hjá børnum og abbabørnum okkara, tað er um veruleikan, ið vit liva í beint nú. Vit eru fyrsta ættarliðið, ið merkir avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum, men vit eru eisini tey síðstu, ið kunnu gera nakað við tað, segði Obama í talu sínari.

Tó eru ikki øll, ið eru líka fegin um uppskotið.

Jeb Bush, bróður fyrrverandi forsetan George W. Bush og uppstillari til komandi forsetaval, kallaði uppskotið fyri ábyrgdarleyst og langtrøkkandi, og vildi vera við, at uppskotið gjørdi seg inn á rættindini hjá statunum at taka teirra egnu avgerðir.

Somuleiðis segði Ted Cruz, senatorur í Texas, at uppskotið stríddi ímóti grundlógini, og at tað fór bert at hava við sær hægri orkuprísir fyri vanliga amerikanaran.

Men hóast republikanarar ikki eru fegnir um uppskotið, so hava danir okkurt at gleðast um, tí uppskotið kann hava við sær stórar fíggjarligar møguleikar fyri donsku orkuvinnuna.

Í fjør útflutti Danmark grøna orkutøkni til USA fyri 3.3 mia. kr., og um uppskotið hjá Obama ikki verður felt, so eru stórir møguleikar fyri at vaksa um tann útflutningin, skrivar Berlingske